**Tíðaravmarkan av útreiðslum í ársroknskapinum 2023**

# 1 Hvussu tíðaravmarki eg útreiðslur?

Tá ið roknskaparárið er farið aftur um bak, er tað meginregluliga ikki trupult hjá stovninum at bóka útreiðslur á farna roknskaparárið, áðrenn farna roknskaparárið í februar/mars verður latið aftur. Veitarin hevur sent eina rokning, og stovnurin hevur bókað og goldið hesa.

Í summum førum kann ósemja vera um støddina á upphæddini, ella nær ið upphæddin fellur til gjaldingar. Tað kann bæði vera tí, at partarnir eru ósamdir um upphæddina, og nær hon fellur til gjaldingar, men tað kann eisini vera tí, at stovnurin hevur ikki fingið eina rokning fyri farna roknskaparárið, tá ið tað endaliga verður latið aftur fyri bóking á ávíst roknskaparár. Dømi: rokningar frá útlendskum sjúkrahúsum fyri viðgerð, ella rokningar fyri uppihald á stovnum uttanlands. Stovnurin veit, at útreiðslan hoyrir til ávísa roknskaparárið.

Tað, sum liggur fast, er, at stovnurin hevur eina skyldu at rinda – spurningurin er ”nær og hvussu nógv”.

Tá skal stovnurin, smbr § 13, stk. 3, gera eina meting av útreiðsluni, sum hoyrir til farna roknskaparárið, og bóka hana á viðkomandi kontu, og ”gjaldið” verður skrásett á eina fíggjarstøðukontu. Hetta ger stovnurin í samráð við gjaldstovuna. Í ”komandi” roknskaparárið, tá ið útreiðslan fellur til gjaldingar, verður møguligur munur bókaður. – *Hetta skal ikki blandast saman við at flyta játtan millum fíggjarár. Verður upphæddin, ið er sett av á fíggjarstøðuni, ikki nýtt til ætlaða endamálið, fellur hon aftur til landskassan.*

# 2 Broyting av § 13 í roknskaparkunngerðini

## 2.1 Frávik frá veitingarmeginregluni um ársskiftið – bert fyri vørur

Í 2017 er stk. 2 (sum fyrr var nr 1) broytt, soleiðis at **vørur** latnar fram til 15. februar 2024, kunnu verða skrásettar upp á fíggjarárið 2023, um keypsavtala varð gjørd fyri ársskiftið. Hetta er eitt frávik frá teirri veitingarmeginreglu, sum var galdandi. Legg til merkis, at **talan er bert um vørur** – sum veitari av flutningsorsøkum o.líkn. – ikki klárar at veita fyri ársskiftið. **Talan er ikki um tænastur**.

## 2.2 Nágreinan av tíðarmarkan av lønum

Fíggjarmálaráðið hevur í rundskrivi og vegleiðing nágreinað, hvussu lønir skulu verða tíðarmarkaðar.

# 3 Hvussu tíðaravmarki eg inntøkur?

Meginreglurnar eru tær somu – tað, sum hevur týdning, er, at stovnurin við árslok hevur vunnið sær rættin til eina inntøku.

***Galdandi reglur fyri tíðarmarkan eru í § 13 í roknskaparkunngerðini:***

***§ 13 í roknskaparkunngerðini***

**§ 13.** [1)] Lønarútreiðslur skulu meginregluliga verða tiknar við í tí roknskaparári, rætturin til lønina verður vunnin. Av tí, at fleiri lønarskyldur ikki koma til útgjaldingar fyrr enn í árinum eftir, skulu stovnarnir tíðaravmarka lønirnar um ársskiftið.
*Stk. 2.* [1)] Útreiðslur og inntøkur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, skulu verða skrásettar, tá ið tær eru latnar. Vørur latnar fram til 15. februar kunnu verða skrásettar upp á árið frammanundan, um keypsavtala varð gjørd fyri árskiftið.
Stk. 3. 1) Í teimum førum, tá útreiðslur ella inntøkur ikki stava frá vørum og tænastuveitingum, skulu tær verða skrásettar, so skjótt, upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá ið goldið verður. Ein upphædd kann gerast upp, um eitt rættarligt krav eftir eini væl greinaðari upphædd kann gerast galdandi. Um eitt munandi krav móti landinum, sum er til eitt ávíst fíggjarár, ikki kann gerast endaliga upp, áðrenn roknskaparárið er lokið, skal upphæddin verða skrásett á einari útreiðslukontu í roknskapinum fyri tað fíggjarárið, grundað á eina meting, soleiðis at upphæddin verður rættað í tí fíggjarári, tá ið kravið endaliga kann verða gjørt upp.
Stk. 4. 1) Út- og inngjaldingar, undir teimum forútgjald, sum ikki beinanvegin kunnu verða beind til eina ávísa útreiðslu-/inntøkukontu, skulu verða skrásett á einari fíggjarstøðukontu, til útreiðslu-/inntøkuskrásetingin kann verða gjørd.
Stk. 5. 1) Tilgongd og nýtsla av vørugoymslu verður skrásett, so hvørt sum vørugoymslan broytist. Sí tó § 19 stk. 2.
Stk. 6. 1) Inntøkur av verkætlanum o. t. – sum rætturin til at taka ímóti, er treytaður av, at ávíst virksemi verður framt - verða tiknar við sum inntøka so hvørt, sum peningurin verður nýttur til ætlaða endamálið.
Stk. 7. 1) Tilgongd av avsettum skyldum skal verða skrásett, tá ið ein bindandi hending er farin fram, og skyldan er sannlík, men óvist er, nær upphæddin fellur til gjaldingar, ella hvussu stór upphæddin er. Nýtslan av avsettum skyldum verður javnað, tá ið skyldan kann gerast endaliga upp, og skyldan verður útint. Nær skyldan ávirkar úrslitið á játtanarroknskapinum er treytað av eftir hvørjum meginreglum, skyldan er tikin við á fíggjarlóg.
Stk. 8. 1) Tilsagnir eiga at verða skrásettar, tá bindandi tilsøgn verður givin. Nær tilsøgnin ávirkar úrslitið á játtanarroknskapinum er treytað av eftir hvørjum meginreglum, tilsøgnin er tikin við á fíggjarlóg.
Stk. 9. 1) Avskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn verða skrásettar við eins stórum upphæddum fyri brúkstíðini viðvíkjandi ognini. Talan er um eina roknskapartøkniliga skráseting, sum ikki ávirkar úrslitið á játtanarroknskapinum.
Stk. 10. 1) Niður- ella uppskrivingar av materiellari støðisogn verða skrásettar, um tað kann staðfestast, at roknskaparliga virðisbroytingin á støðisognini er varandi. Talan er um eina roknskapartøkniliga skráseting, sum ikki ávirkar úrslitið á játtanarroknskapinum.
Stk. 11. 1) Í roknskaparligu ískoytistíðarskeiðunum verða útreiðslur og inntøkur skrásettar, sum hoyra til júst farna roknskaparár. Hesar skrásetingar eiga at verða avmarkaðar til tey føri, har serligar orsakir eru til, at skrásetingin ikki hevur kunnað verið gjørd fyrr.
Stk. 12. 1) Tey roknskaparligu ískoytistíðarskeiðini verða eisini nýtt til at skráseta eftirbókingar.